# *Samhaldsfastiarbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin – ein pensiónsgrunnur ella ein skattur?*

***Ógvuslig mótmælir komu nú um dagarnar frá 26 fakfeløgum, tí nýggja samgongan bleiv løgd undir at vilja fara eftir Samhaldsfastaarbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Hesin grunnur fær øll hugsandi superlativir og verður sagdur at verða eitt tíðandi íkast hjá pensiónistum. Men er hetta veruliga so?***

Nú um dagarnar mótmæltu ógvusliga ikki færri enn 26 fakfeløg pástandin um, at landsstýrið ætlaði at fara eftir Samhaldsfastaarbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (longu navnið sigur, at hetta er ein ómøgulig konstruktión - orki ikki at skriva hetta orðið aftur og kalli hann tí bara framyvir ”grunnurin” ella ”AMEG”) í samband við ein pensiónsreform. Hetta er tó avsannað av landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Men hvat er tað nú, sum er so fantastiskt við hesum grunni? Ein sólskinssøga? Riggar væl? Týðandi ískoyti hjá øllum pensiónistum? Ongin verður settur eftir? Neyðugt afturat almennum pensiónum og persónligari eftirløn? Osfr. Ljóðar vakurt!

Bleiv forvitin, tí hetta er jú í beinari mótsøgn av tí, fyrrv. løgtingsmaður Fólkafloksins, Jóan Magnus Rasmussen ferð eftir ferð, hevði ført fram, og fór tí at rokna upp á dømir um faktisk tøl, sum kunnu koma fyri. Og bleiv satt at siga skelkaður!

AMEG er fyri allar flestu føroyingar ein fjaldur skattur, um tú ikki er so ”heppin”, at árini eru so mong, at hendan enntá trídupultskattingin av tíni løn ikki nær at taka ov nógv frá tær. Tað eru bert tær heilt lágu inntøkurnar niðanfyri kr. 200 tús., har pensiónisturin fær sínar pengar aftur!

Ert tú yngri enn 50 ár (skipanin er frá 1991), hevur eina vanliga meðalinntøku, arbeiðir til tú er 75 ár og fært 100 tús. í løn sum pensiónistur og nært meðallivialdur, hevur tú og arbeiðsgevari tín goldið 392 tús. meiri inn, enn tú fert at fáa út, ella í veruleikanum goldið inn kr. 2.179 um mánaðin hvønn mánað, tú livir sum pensiónistur - og tú, sum helt, at tú fekst útgoldið kr. 5.590! (Gjald frá arbeiðsgevara tínum er tikið við, tí eisini hann skal gjalda fyri tína løn, sum so ella so verður mótroknað).

Skelkandi? Tað haldi eg!

Um tú hevur aðra ársinntøku, men annars við somu fortreytum, sum omanfyri, eru tølini hesi:

| Ársinntøka: | Samlað inngjøld: | Vunnin/mist upphædd: | Svarar til mánðargj.; |
|---|---|---|---|
| Kr. 100.000 | kr. 743.730 | + kr. 262.470 | + kr. 1.458 |
| Kr. 200.000 | kr. 1.060.980 | - kr. 54.780 | - kr. 304 |
| Kr. 300.000 | kr. 1.398.480 | - kr. 392.280 | - kr. 2.179 |
| Kr. 400.000 | kr. 1.749.480 | - kr. 743.280 | - kr. 4.129 |
| Kr. 500.000 | kr. 2.080.230 | - kr. 1.074.030 | - kr. 5.967 |

(Sí útroknað dømi niðanfyri).

Hevur ongin av teimum 26 fakfeløgunum, sum skullu eitast fyri at verja sínar limir (eisini mótvegis tí almenna) eftirroknað hesa skipan, sum ikki bert skattar ella dupultskattar tínar lønir/pensiónir, men trídupult skattar tær? So pensiónin fyri flestu av limunum hjá fakfeløgunum blívir til ein skatt í staðin?

Fantastisk skipan? Ja - fyri landskassan!

Johan Petersen

***Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin – ein pensiónsgrunnur ella ein skattur?***

***Fortreyt:*** við núverandi gjøldum og skatting verður samlaða úrslitið hjá øllum undir 50 ár við

| ársintøku | ár í arbeiði | pensionistaarbeiði | ársintøka sum pensionistur | livitíð |
|---|---|---|---|---|
| kr. 300.000[1)] | 45 ár[2)] | 8 ár[3)] | kr. 100.000[4)] | 82 ár[5)] |

***Við inngjald:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Lønmóttakari: | 3% av kr. 300.000 í 45 ár | kr. - 405.000 | |
| | Skattur 40 % av inngjaldi | - - 162.000 | kr. - 567.000 |

***Við útgjald:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Lønmóttakari: | kr. 5.590 pr. mðr. í 15 ár | kr. 1.006.200 | |
| | Skattur 40 % | - 402.480 | kr. 603.720 |
| Vinningur | | | kr. 36.720 |
| | | | |
| Svarar til | | | kr. 204 pr. mðr. |

Men arbeiðsgevarin skal eisini gjalda (upphædd, sum onkursvegna verður mótroknað í lønini):

***Við inngjald:***

| | | |
|---|---|---|
| Arbeiðagevari: | 3 % av kr. 300.000 í 45 ár | kr. - 405.000 |
| - - - | 3% av kr. 100.000 í 8 ár | - - 24.000 |
| Inngjald arbeiðsgevari | | kr. - 429.000 |
| | | |
| Inngjald lønmóttakari | | - - 567.000 |
| | | |
| Samlað inngjald (excl. skatt av útgjaldi) | | kr. - 996.000 |

***Við útgjald:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Lønmóttakari: | kr. 5.590 pr. mðr. í 15 ár | kr. 1.006.200 | |
| | skattur 40 % | - 402.480 | kr. 603.720 |
| Hall | | | kr. – 392.280 |

Svarar til eina **útreiðslu í pensiónistatíðini** upp á **kr. 2.179 pr. mðr**.

Viðm.:

1) Meðalinntøka í 2017 var kr. 310.906 (Hagstovan, seinasta tal)
2) Ár á arbeiðsmarknaðinum (frá 22 – 67 ára aldur, leyslig meting)
3) Ár á arbeiðsmarknaðinum sum pensionistur (frá 67 – 75 ára aldur, leyslig meting, Hagsatovan: 52 % eru á arbeiðsmarknaðinum í bólkinum 65-74 ár)
4) Árlig inntøka eftir 67 ára aldur (leyslig meting)
5) Meðal livi aldur 82,3 ár (Hagstovan)